**LANDSVERKFRØÐINGURIN**

J. nr. KR /-

*(at tilskila í svari)*

Í 1999 setti løgmaðurin eina nevnd at gera tilmæli ~~til~~ um eina miðsavnaða byggiumsiting. og ~~Niðurstøðan hjá meirlutanum í nevndini var, at~~ leggja eina byggiumsiting á LV-stovnin.

Tórshavn, tann 30-05-2003

# Álit viðv. byggiumsitingini á Landsverkfrøðingsstovninum

Meirlutin í nevndini mælti til at miðsavna umsiting av bygningum og bygging á LV-stovninum.

**Afturlítandi samandráttur**

Meðan Landsverkfrøðingsstovnurin – millum manna nevndur Landsverkfrøðingurin – í mannaminni hevur umsitið útbygging og viðlíkahald av samferðslukervinum í Føroyum, hevur eingin tilsvarandi umsiting verið fyri bygging og viðlíkahaldi av landsins bygningum, fyrr enn ein arkitektur saman við einum hjálparfólki í áttatiárunum vórðu sett at røkja hesa uppgávuna. Hetta var tó als ikki nøktandi, til tess var manningin alt ov lítil, og hartil kom, at nú vóru tvær paralellar umsitingar, ið fyri ein stóran part kundu gjørt sama arbeiði. At kalla einki samskifti var tó millum umsitingarnar báðar, sum tí ongan fyrimun fingu av servitanini og royndunum hjá hvørjum øðrum.

Tað var skilligt, at meðan útbyggingin og viðlíkahaldið av vegum og havnum var í góðum hondum – sjálvsagt í mun til tær til eina og hvørja tíð galdandi játtanir – kundi ikki tað sama sigast um landsins bygningar. Men skuldi tann neyðuga umsitingin byggjast upp, fekst veruliga ein dupultfunktión, tí ein slík umsiting var frammanundan hjá Landsverkfrøðinginum við áralongum royndum. Tað var tí ein náttúrlig hugsan, ið tók seg upp um, at savna allar byggitekniskar uppgávur í eini felags umsiting ~~á Landsverkfrøðingsstovninum. Hetta varð eisi~~ni niðurstøðan hjá meirilutanum í tí nevndini, ið løgmaður setti í 1999 at gera tilmæli um eina miðsavnaða byggiumsiting. og at leggja hana á Landsverkfrøðingsstovnin.

Tað vísti seg tó, at politisk semja fekst ikki um, hvussu hetta málið skuldi fremjast í verki, hóast breið undirtøka tyktist vera fyri eini miðsavnaðari byggiumsiting á Landsverkfrøðingsstovninum. Løgmaður tók tí avgerð um at greiða ein part av málinum umsitingarliga, fyri at fáa miðsavnaðu byggiumsitingina at virka, og í tí sambandi flutti hann í február mánað 2001 ræðisrættin til ávísar høvuðskontur (løgujáttanir) til landsstýrismannin í vinnumálum. Sama endurtók seg í 2002, og royndirnar hesi bæði árini prógvaðu, at skipanin virkaði væl.

Framvegis var tó ósemja í Landsstýrinum um mannagongdirnar, og tí vildi løgmaður ikki flyta ræðisrættin á løgukontunum fyri triðju ferð. Úrslitið er, at vit nú aftur eru í somu støðu sum fyri

Tinghúsvegi 5 • Postboks 78 • FO-110 Tórshavn • lv@lv.fo • Tlf. +298 311333 • Fax +298 314986

2001. Tann munurin er tó, at tey trý fólkini, ið áður vóru í starvi hjá ávikavist Fíggjar- og Heilsumála-stýrinum framvegis eru í starvi á Landsverkfrøðingsstovninum.

**Hvat megnar LV?**

Stórar broytingar eru farnar fram á Landsverkfrøðingsstovninum hesi seinastu 2-3 árini. Meðan stovnurin frammanundan í stóran mun var projekterandi og útinnandi, serliga innan vegabygging, men eisini á øðrum økjum, eitt nú havnabygging og býarplanlegging, er støðan nú tann, at projektering og útinning í størst møguligan mun verður latið privatum fyritøkum at gera, meðan LV í stóran mun samlar seg um planlegging og tað at verða ein professionellur byggiharri. Tó verða allar aðrar veitingar og tænastur, sum ikki beinleiðis nakað hava við nýgerð at gera, framvegis framdar í sama mun sum áður.

Hóast stovnurin frammanundan hevði eitt slag av yvirskipaðum eftirliti, lá byggiharraleikluturin á láni. Hetta var tó ikki nakað serføroyskt fyribrigdi, men var yvirhøvur galdandi aðra staðni eisini. Hesi seinnu árini er tað tó vorðið meira og meira greitt, at fyri at uppnáa eitt optimalt úrslit fyri eina byggiverkætlan, er alneyðugt, at byggiharrin verður meira virkin og sjónligur. Á Landsverkfrøðings-stovninum hevur hesi seinastu árini stórur dentur verið lagdur á at byggja upp eina professionella byggiharraumsiting, sum uppfyllir tey krøv, ið sett verða til ein professionellan byggiharra. Hetta hevur eydnast so mikið væl, at vit í dag kunnu sammeta okkum við aðrar professionellar byggiharrar í okkara grannalondum. Tað merkir tó ikki, at vit í dag kunnu seta okkum hendur í favn, tvørtur ímóti er neyðugt alla tíðina at fylgja við og menna stovnin, so uppgávurnar verða loystar á bestan hátt. Men hetta krevur, at Landsverkfrøðingsstovnurin fær tann neyðuga, politiska stuðulin.

Í løtuni eru trý ársverk á Landsverkfrøðingsstovninum, ið eru ætlað til verkætlanir fyri onnur ráð enn Vinnumálaráðið, tvs. at um tænastur fyri onnur ráð krevja størri orku, enn hesi trý ársverkini, mugu einstøku verkætlaninar bera hesa útreiðslu.

Samanumtikið kann tí sigast, at LV framvegis á ein fullgóðan hátt megnar at røkja tær tænastur fyri Vinnumálaráðið, sum verða álagdar stovninum. LV roynir støðugt at menna seg sjálvan, tað veri seg við atliti til uppgávur, sum verða framdar sambært "gamlari siðvenju" ella aðrar uppgávur, ið stovnurin fær álagt at røkja. Eisini hevur stovnurin allan tann neyðuga førleikan, sum krevst, fyri at átaka sær byggiumsitingarligar uppgávur fyri onnur ráð, um politiski viljin er til tess.

ella ~~tít at halda~~ ískoyti til LV-tænastu - menna LV-[illegible].

**Fyrimunir við miðsavnaðari byggiumsiting**

Ein treyt fyri at fáa skipað viðurskifti innan almenna byggiumsiting í Føroyum eins og aðra staðni er, at tann neyðugi bygnaðurin er til staðar. Við undantak av onkrari av teim størstu kommununum finst ein tílíkur bygnaður bert á LV-stovninum. Skulu aðalráðini hvørt í sínum lagi byggja upp sín egna bygnað, fáast óneyðugar dupultfunktiónir, sum har umframt føra við sær eyka útreiðslur. Eisini vildu hesar byggiorganisatiónirnar verið so smáar, at tað hevði ikki verið møguligt at liva upp til tey krøv, sum í dag verða sett einum professionellum byggiharra. Fyrimunurin við at miðsavna byggiumsitingina á LV-stovninum er tí eyðsæddur.

Annar fyrimunur við miðsavnaðu byggiumsitingini er, at vitan og royndir verða savnað á einum stað. Hetta er sera umráðandi fyri at kunna arbeiða effektivt og rationelt (neyðugt verður ikki at uppfinna djúpa diskin meira enn einaferð).

**Lønarkarmur til onnur aðalráð**

Tá ræðisrætturin til løgujáttaninar varð fluttur til Vinnumálaráðið og haðani til Landsverkfrøðingsstovnin, fylgdi lønarkarmurin við fyri teir tríggjar persónarnar, sum frammanundan starvaðust við byggiumsiting hjá ávikavist Fíggjarmálaráðnum og Almanna- og heilsumálaráðnum. Hetta verður tulkað soleiðis, at trý ársverk eiga at verða brúkt til arbeiðir fyri onnur ráð enn Vinnumálaráðið, har tað verður hildið verða skilabest, meðan annað arbeiði fyri hini ráðini bert kunnu fremjast, um tøk arbeiðsorka er til tess, og tá bert móti gjaldi, tvs. at verkætlaninar bera kostnaðin av hesum arbeiði. Tí er tað sannlíkt, at LV í summum førum má nokta fyri at átaka sær uppgávur, ið ikki hoyra undir Vinnumálaráðið, og viðkomandi ráð má tí í hesum førum leita sær ráðgeving og stuðul aðra staðni.

**Alternativar loysnir í sambandi við løgujáttanir**

1. Ræðisrætturin verður fluttur fyri hvørja verkætlan sær. Avvarandi ráð kann biða løgmann flyta ræðisrættin til VMR/LV, tá ein verkætlan skal setast í verk. Stóri fyrimunurin er, at neyðugar heimildir og ábyrgdir fylgjast. Í prinsippinum er hetta sama loysn, sum hevur verið praktiserað seinastu tvey árini við góðum úrsliti, og av alternativu loysnunum meta vit hesa tað frægastu. Ein vansi er, at tað ikki er greitt frammanundan, hvørjar verkætlanir LV-stovnurin skal umsita, og tí verður meira torført at planleggja uppgávur fram í tíðina.

2. LV fær disponeringsrættin yvir játtanini. Avvarandi ráð og LV gera ein sínámillum Project Management sáttmála. Hetta merkir, at LV fær fulla ábyrgd yvir fyri avvarandi ráð av, at

11.08.00

verkætlanin verður framd frá byrjan til enda, herundir fíggjarliga ábyrgd, eins og ábyrgd av, at ásettir tíðarkarmar verða hildnir. Hetta merkir, at meðan LV hevur fulla ábyrgd yvir fyri avvarandi ráði, hevur avvarandi ráð fulla ábyrgd yvir fyri Løgtinginum. Fyrimunir og vansar við hesi loysnini eru áleið teir somu, sum nevndir eru undir alternativi 1, tó má full greiða fáast á, um henda loysnin stríðir ímóti lógum ella reglugerðum. Ein annar vansi er, at viðurskiftini millum ávikavst LV øðrumegin og aðalráðini hinu megin ikki eru so greið, sum tá ræðisrætturin verður fluttur, men hesin trupulleikin kann loysast við væl skipaðum mannagongdum.

3. LV er ráðgevari burturav. Henda loysnin hevur tann stóra vansan, at fíggjarlig og teknisk ábyrgd fylgjast ikki, tað er sera óheppið, tí tá kunnu byggiharri og ráðgevari lætliga gerast ósamdir vegna ymisk áhugamál. Í øllum førum má avvarandi ráð hava okkurt slag av byggikønari fyrisiting, ið kann meta um tilmælir frá ráðgevaranum og út frá tí gera síni egnu tilmæli.

**Raðfesting av uppgávum fyri onnur ráð**

Hvussu tey trý ársverkini, ið vórðu flutt til Landsverkfrøðingin, best kunnu gagnnýtast, er ein leiðsluspurningur hjá stovninum, men ein loysn kundi verið at nýtt hesi ársverkini til planlegging og viðlíkahald, meðan ráðgeving annars í sambandi við íløgur verður fíggjað av teim einstøku verkætlanunum. Raðfestingin má tó gerast við støði í teimum til eina og hvørja tíð galdandi umstøðum.

4: Fast-stab til viðlíkahald -og basisberedskab.
+ projekt ~~an~~ansættelser.

23.05.02

**LV- byggiumsiting**
**Upprit um tænastur til onnur stýri**

Eftir avgerð løgmans, er umsiting av bygningum og av byggimálum savnað hjá LV-stovninum.

Ábyrgd av einum stórum parti av hesum málinum er hjá øðrum stýrum, og er umsitingin av teimum sostatt ein tænatsta, sum LV-stovnurin veitir til onnur stýri.

Byggiumsitingin hjá LV-stovninum veitir tænastur í sambandi við:
- nýbygging
- bygningsviðlíkahald
- onnur mál, sum á ymiskan hátt eru tengd at bygging og bygningar

1. Nýbygging
   Arbeitt verður í løtuni við mannagongd fyri nýbygging og umsiting av løgujáttanini ísambandi við hesum, so hetta verður ikki umrøtt

2. Bygningsviðlíkahald
   Stovnsleiðarar hava ábyrgd av teimum bygningum, har stovnurin hýsast. Avvarandi stýri skal útvega játtan (rakstur) til bygningsviðlíkahald. Byggimsitingin hjá LV-stovninum umsitir í summu førum hesa játtanina í samráð við stovnsleiðaran/húsavørðin og stýrið, eins og byggiumsitingin ger játtanaruppskot til fíggjarlógin – framvegis í samráð við stovns-leiðarar og stýri.
   Byggiumsitingin tekur stig til at seta arbeiðini í verk og kannar og váttar rokningar, áðren tær verða sendar til stýrini til ávísingar.

3. Onnur mál
   - sýning og virðismeting av ognum í sambandi við keyp og sølu
   - ráðgeving fyri stýri og stovnar í sambandi við hølisætlanar – hølisstrategi
   - studningsmál
   - ymiskt annað

Byggiumsitingin er partur av LV-stovninum, og er hon umfatað av lønarkarminum hjá stovninum.
Tá ið tænastur verða veittar til øðrar stovnar og stýri, merkir tað, at partur av lønarjáttanini til LV-stovninum verður nýttur til virksemi fyri onnur stýri.

Byggiumsitingin ásannar, at tænastan, sum verður veitt, ikki er nøktandi. Sera nógv mál verða beint til byggiumsitingina, og er hon, sum er, ikki mannað til at avgreiða málini nóg skjótt. Mannagongdin er stórt sæð, sum hon var áðren bygnaðabroytingin í '97, tá Landsarkitekturin virkaði hjá Fíggjar- og Búskapardeildini á Landsskrivstovuni. Tað merkir, at málini vanliga verða viðgjørt í tí raðfylgju, tey koma inn, og tann, sum letur flest mál inn, fær flest mál viðgjørt.

Fyri at kunna virka sum umsiting fyri allari almenna bygging og bygningar, má umsitingin hava nøktandi manning, og hetta reisir spurningin um hvussu umsitingin skal lønast.
Í hesum sambandi verður eisini nomið við ábyrgda- og heimildabýtið.

Her eru ymiskar møguleikar.

1. Byggiumsitingin sendir rokning
   Hetta er einfalt , og fær byggiumsitingin sama status mótvegis stýrini sum privat virki.
   Hetta hóskar tó neyvan við politiska ætlanina við einari miðsavnaða byggiumsiting.

2. Ein ávísur partur av játtanini verður avsettur til lønir, og verður upphæddin flutt millum stýrini – inntøkufíggjað virksemi

3. Játtanirnir verða latnar beinleiðis til Vinnumálastýrið/LV-stovnin.

# Dømi um byggimál

1 Leigumálið hjá Fiskimálastyrinum er uppsagt/Ein bygningur á landskjúkrahúsinum treingir sambært viðlíkahaldsskipanini til stóra umvæling.

2 Bygningsdeildin kannar, um annað leigumál kann fáast/ Bygningsdeildin kannar um bygningurin skal umvælast, seljast ella byggjast upp av nýggjum.

3 Byggideildin ger neyðugar forkanningar.

4 Bygningsdeildin velur at byggja/ Bygningsdeildin velur at umvæla.

5 Bygningsdeildin ger eitt byggiprogramm. Í ávísum førum kann verða gjørt eitt uppskot til byggiprogramm fyrst. Eksternir ráðgevarar kunnu verða nýttir

6 Programmið verður latið byggideildini til granskingar.

7 Á fundi millum bygningsdeild og byggideild verður programmið viðgjørt og møguliga tillaga.

8 Byggideildin ger avtalu við ráðgevara og hevur samskifti við hendan, men um fakligir spurningar eru, skulu hesir leggjast fyri Bygningsdeildina.

9 Skitsuprosjekt, prosjektuppskot og høvuðsprosjekt verða granska av báðum deildum, og fundur verður hildin. Ikki er altíð neyðugt við skitsuprosjektum og prosjektuppskotum. Samkiftið við hini aðalstýrini hevur bygningsdeildin.

10 Umboð frá báðum deildum hava fund við ráðgevan. Skitsuprosjekt og prosjektuppskot verða góðkend, meðan høvuðsprsojekt bert verða góðkend internt, og viðmerkingar/krøv verða send til ráðgevararnar.

11 Byggideildin stendur fyri útbjóðing og licitatión.

12 Byggideildin hevur byggileiðsluna undir gerð, og stýrir tí eksterna fakeftirlitinum. Stinga spurningar seg upp, sum hava funtionella ella estætiska ávirkan, skulu hesir leggjast fyri

bygningsdeildina. Eru nógvir spurningar av hesum slag, kann umboð frá bygningsdeildini vera við á fundum. Byggideildin kann deila byggileiðsluppgávuna út til privatar, og bert hava yvirordnaða byggileiðslu.

13 Til avhending og garantisýn eiga umboð frá báðum deildum at vera til staðar, men byggideildin hevur ábyrgdina av, at alt gongur rætt fyri seg.

Um ósemjur skuldu stungið seg upp millum bygnings- og byggideild, verða hesar loystar á fundi millum deildarleiðararnar og stjóran.

Hetta er bert ein fyribils leyslig mannagongd, sum hon kundi sæð út.

OB

ad 12: og, heldur "leiðarabólkur" - sum

J. nr. ob-114

*(at tilskila í svari)*

Løgmanskrivstovan
Att. Ole Jensen
Postboks 64
FO-110 Tórshavn

Viðv.: Bygnings- og byggiumsiting landsins.

Takk fyri viðmerkingarnar, sum vóru okkum í hendi 30.10.00. Sum eg nevndi í telefonini og í teldubrævinum, haldi eg, at tað eru nógvar misskiljingar, sum krevja eina nærri frágreiðing, áðrenn vit halda tann næsta fundin. Eg vil fyrst gera viðmerkingar til tínar viðmerkingar. Síðani vil eg royna at lýsa mínar tankar við einum dømi.

ad. Viðm.1: Vit eru einigir í, at ein deild skal hava fulla ábyrgd av teimum uppgávum, hon fremur. Spurningurin er so, hvat uppgávan er? Í hesum førinum var ætlanin, at bygningsdeildin skal tryggja, at vit fáa ein bygning, sum fakliga er í lagi, bæði so og so, og at bygningurin kann vera bygdur fyri eina ávísa upphædd og innanfyri eitt ávíst tíðarskeið. Hetta verður gjørt við at gera eitt dygdargott programuppskot/ byggiprogram, og við at taka tær fakligu avgerðir, í øllum fasum, sum eru neyðugar fyri, at fíggjar- og tíðarkarmar skulu halda. Fyri at tryggja, at prosjektstýringin ella byggiumsitingin (ikki prosjektleiðslan) fer fram á ein professionellan hátt, verður ein deild til hetta endamál. Hetta er ein seruppgáva, sum ikki hevur nakað við arkitektur at gera, men svarar til uppgávuna hjá einum bygharraráðgevara (ikki prosjekteknisk rágeving). Ágóðarnir eru millum annað, at byggiumsitingin verður eins skipað fyri allar uppgávur á stovninum, og at ein slíkur bygnaður kemur at hava eina innbygda dygdartrygging við sær. Við greiðum mannagongdum er møguligt at fáa eitt greitt ábyrgdarbýti og at tryggja kontinuitetin. Ætlanin er, at hesar deildir skulu

samarbeiða. Bygnaðurin við ábyrgdarbýti fyri einstøku uppgávurnar og áseting um samskiftisskipan verður ásett í avtalunum og í programmunum. Styrkin í mun til nú- og fyrrverandi skipanir í Føroyum er, at tíðarætlanir, kostnaðarætlanir og dygdartrygging verður raðfest frammarlaga. Bygharrauppgávan hevur í Føroyum verið ógvuliga lágt raðfest, og tí hevur verið heilt vanligt, at stórur partur av byggiumsitingini hevur verið lagdur út til teir teknisku ráðgevararnar, sum meira ella minni hava roynt at gjørt hetta arbeiðið. At tað nú skal geva bureaukratisering og fløkt ábyrgdarbýti, bert tí at hetta arbeiðið verður gjørt av eini deild á sama stovni, sum bygharrin situr í, er mær heilt óskiljandi. Í staðin átti bygharrin at følt tað tryggjandi, at ein deild, sum einki annað endamál hevur, syrgir fyri, at byggiumsitingin er nøktandi.

ad. Viðm.2: Viðvíkjandi arkitektaumhvørvinum eru vit eisini samdir. Eg havi roknað við, at eini 5-6 fólk arbeiða á deildini, sum frá líður, og at tað verður deildarleiðarin, sum eigur at finna tey røttu fólkini. Stjórin verður tó við í processini, tá ið fólk skulu setast í starv.

Viðvíkjandi bygningsánara- og byggharraviðurskiftum rokni eg við, at vit meina við nøkurlunda tað sama. Tá ið nakað skal gerast við verandi bygningar, ella nýggir bygningar skulu byggjast, verður hetta gjørt sambært uppritinum til Løgmann dagf. 11.08.2000. Tó verður tað soleiðis sambært politiskari avgerð, at Vinnumálastýrið fær ábyrgdina av viðlíkahaldi og bygging av øllum almennum bygningum, og harvið má onkur á stovninum hava hesa ábyrgd, bæði í byggi- og brúksfasunum. Raksturin liggur tó eftir í ymisku aðalstýrunum.

Viðvíkjandi "bygharrarágeva" verður ikki meint við prosjekttekniska rágeving í vanligari merking. Bygharrar aðrastani hava ofta tekniskar rágevarar (prosjektering v.m.) og bygharraráðgevarar samstundis, har bygharraráðgevin hjálpir til við at stýra uppgávuni (byggeadministration og forretningsstyring). Tað er hetta slagi av ráðgeva, eg meini við. Eingin forðing er fyri, at ein ella fleiri arkitektar kunnu arbeiða á eini slíkari deild, men tað verður deildarleiðarin, sum skal fáa deildina at virka, og í princippinum er tað líka mikið, um tað eru arkitektar, verkfrøðingar ella aðrir teknikarar, sum arbeiða á eini slíkari deild.

Viðvíkjandi "Byggiprogrammi" er ætlanin, sum tað eisini er skrivað, at Bygningsdeildin ger byggiprogrammið, meðan báðar deildirnar tillaga programmið um neyðugt. Byggideildin er serkøn í byggiumsiting, og má hesin parturin av programminum eisini raðfestast. Hettar samstarvið í programmeringsfasuni og øllum eftirfylgjandi fasum verður, sum nevnt, samstundis ein formur fyri sjálvirkandi dygdartrygging.

Ovasta petti á síðu 3 haldi eg vera drigið longur yvir í tann negativa rætningin, enn hvat kann koma undir misskiljingar. Uppgávan og ábyrgdin hjá deildarleiðaranum á bygningsdeildini er meira enn bara at skapa eitt umhvørvi. Hvat "størri broytingar" eru, verður ein avtala gjørd um millum deildirnar og evt. stjóran. Tað, sum eg kann koma í tankar um sum smærri broytingar, er t.d. broyting í armeringini, umleggjan av installatiónum o.t. Tvs. har funktión, dygd og útsjónd ikki verða ávirkað.

Viðvíkjandi øðrum petti á síðu 3 havi eg fylgjandi viðmerking: Hví skulu vit hava tríggjar funktiónir, sum gera just tað sama, tá ið vit kunnu hava eina? Stórur vandi er fyri, at hesar tríggjar funtiónir fara at virka upp á tríggjar ymiskar mátar. Tað er sera umráðandi, at ráðgevarar og entreprenørar kenna treytirnar og avleiðingarnar, tá ið hesar ikki verða hildnar. Ein stovnur kann ikki liva við, at øll feløg, sum arbeiða fyri stovnin, ikki vera viðgjørd eins. Hetta verður serliga umráðandi, tá ið stovnurin framyvir fer at herða krøvini til, at avtalur vera hildnar.

Viðvíkjandi triða petti á síðu 3 er at siga, at um byggideildin tekur yvir, merkir tað ikki, at fakdeildirnar verða koblaðar av. Eg haldi, tað er greitt frá hesum sjónarmiði fyrr í hesum skrivi. Við bara eitt sindur av góðum vilja kunnu fakdeildirnar síggja tað, sum um tær fáa ein annan at gera tað arbeiðið, sum ikki hevur við tað fakliga at gera. Eg eri vísur í, at tað ber til at áseta væl og viriliga, hvør hevur bæði ábyrgd og heimildir eftir hesum mynstri.

Viðvíkjandi fjórða petti á síðu 3 er at siga, at fakdeildirnar koma at hava bæði ábyrgd og heimildir.

At enda vil eg leggja áherðslu á, at líkamikið hvussu optimalur ein bygnaður er, er altíð neyðugt við samarbeiði millum deildir. Deildarleiðararnir hava fyrst og fremst

ábyrgdina av, at egin deild virkar, men hetta má tó ikki vera til ampa fyri hinar deildirnar; so nakað av felagsábyrgd fylgir eisini við.

Eg eri heilt samdur í, at vit eiga at tosa saman. Lat okkum finna eina tíð í telefonini.

Vinarliga

Oyvindur Brimnes
Stjóri

# Bygnaður " Byggiumsiting Landsins "

Uppskot 01, 21-11-00 / oj



# Framtíðarvirksemið hjá landsarkitektinum

Viðmerkingar til uppleggið frá Løgmansstýrinum um framtíðarvirksemið hjá landsarkitektinum.

**Eg taki undir við upplegginum sum heild, og havi skrivað mínar viðmerkingar á gráari bakgrund.** 04.11.98 Ole Jensen

# Hvussu skal framtíðarvirksemið viðvíkjandi arkitektafunktiónini skipast

- Upplegg til kjak -

--------

**Løgmansskrivstovan**
**Nýskipanardeildin**
**Fyrisiting av landsins ognum**

Hetta uppleggi er gjørt til tess at fáa kjak í lag um hvat tað er fyri virksemi fyrisitingin ynskjir at arkitektafunktiónin skal hava..

Tá niðurstøða er gjørd, kann støða takast til, hvar funktiónin organisatoriskt skal skipast.

**Útgreina uppgávu- og heimildarbýtið**
Í sambandi við bygnaðarbroytingarnar í miðfyrisitingini er støðan viðvíkjandi arkitektinum vorðin ógreið. Tað er alneyðugt at støða verður tikin til framtíðarvirki hjá arkitektinum, áðrenn hetta øki syndrast heilt.

Tað er av stórum týdningi, at gjørd verður ein staðfesting av, hvussu hetta virkisøkið skal virka. Hugsað verður í hesum sambandi um:

- lýsing av uppgávum
- lýsing av heimildum

áðrenn støða verður tikin til hvar arkitektafunktiónin organisatoriskt skal skipast.

**Endamálið við arkitektfunktiónini**
Endamálið við arkitektinum er at útvega landsins stovnum o.ø. neyðug hølir við atlitið til fíggjarligar karmar, og at umsita og menna byggiverkætlanir og landsins ognir soleiðis at umhugsni fyri mentan, umhvørvi og arkitektur verður røkt og varðveitt.

**Viðmerkingar**: Um raðfylgjan lýsir raðfestingina, vildi eg býtt høvudssetningarnar um soleiðis:

Endamálið við arkitektinum er at umsita og menna byggiverkætlanir og landsins ognir soleiðis at umhugsni fyri mentan, umhvørvi og arkitektur verður røkt og varðveitt og at útvega landsins stovnum o.ø. neyðug hølir við atlitið til fíggjarligar karmar.

**Høvuðsuppgávur:**
Høvuðsuppgávurnar hjá arkitektinum kunnu í býtast upp í tvey: Hølisviðurskifti (bygging/leiga) og játtanarstýring (stýring og eftirlit).

Høvuðsuppgávurnar kunnu sundurgreinast soleiðis:

- ráðgeving av aðalstýrum og stovnum í sambandi við hølisviðurskifti (ný- og umbygging)
- ábyrgd fyri ný-og umbygging
- játtanarstýring í sambandi við byggiverkætlanir og viðlíkahald
- fyrisiting av leigu av bygningum til almennar stovnar o.a.
- viðlíkahald, eftirlit og góðkenning av friðaðum bygningum
- aðrar tvørgangandi uppgávur
- 
- skráseting av landsins ognum (bygningar, træðir), skráseting av leigumálum.

**Ný- og umbygging:**
Ný- og umbyggingar verða ráðlagdar í sambandi við løgujáttanina á fíggjarlógini.

Játtanir til ný- og umbygging av hølum verða savnaðar undir somu grein á fíggjarlógini, sum viðkomandi landsstýrismaður hevur ábyrgdina fyri. Játtanin kann vera ein samlað játtan ella býtt út á endamál.

Tað vildi verið sjálvsagt, at arkitekturin fekk ávísingarheimild til játtanina.

Við nýbygging og størri umbyggingum verður ein bygginevnd sett, har arkitekturin hevur formannin í bygginevndini, og hinir limirnir eru frá avvarandi stýri og umboð frá viðkomandi byggistaði.

**Ný- og umbygging:**
Umsøkn um játtan til ný- og umbygging verður latið Fíggjarmálastýrið av aðalstýrinum, sum ætlar at fara undir bygging. Tað verður væntandi eisini framyvir soleiðis, at eitt aðalstýri, sum ætlar at fara undir bygging, eisini má "berjast" fyri at fáa játtanina, og tískil meti eg tað vera rætt, at viðkomandi stýri eisini fær ábyrgdina og heimildina. Landsarkitekturin skal vera í bygginevndini fyri at hava neyvt eftirælit við byggimálinum, og skal Landsarkitekturin vátta allar rokníngar, áðrenn tær verða ávístar.
Eg meti hetta vera besta trygd fyri stýring av byggiarbeiðinum og av byggiútreiðslunum.
Soleiðis er tað er skipað í dag, men ein trupuleiki er, at rokninga-avgreiðslutíðin gerast ov lang.
Eg havi ikki eitt ítøkuligt uppskot til, hvussu hetta kann loysast.

**Studningsmál:**

Stuðulsumsóknir í samband við bygging verða lagdar til arkitektfunktiónina til ummælis og um peningur verður játtaður verður málið avgreitt og fylgt upp av arkitektinum.

**Viðlíkahald**:

Fyrisitingin av øllum ognum landsins og viðlíkahald av bygningunum verða miðsavnað undir einum landsstýrismanni. Tann samlaða viðlíkahaldsjáttanin verður á fíggjarløgtingslógini løgd til eina og somu grein.

Allar friðaðar ognir hjá landinum verða tó á fíggjarløgtinglógini undir gr. 4, sum verður umsitin av Fornminnissavninum, ið hevur tætt samstarv við arkitektafunktiónina.
Viðlíkahald.:
Landsarkitekturin stadfestir viðlíkahaldstørvinfyri allar bygningar hjá landinum, og ger hann uppskot til viðlíkahaldsjáttan. Landsarkitekturin setur viðlíkahaldsarbeiðini í verk í samráð við viðkomandi stovn / stýri, og verða arbeiðini styrd av Landsarkitektinum, sum hevur ávísingarheimildina .

Viðlíkahald.:
Landsarkitekturin stadfestir viðlíkahaldstørvinfyri allar bygningar hjá landinum, og ger hann uppskot til viðlíkahaldsjáttan. Landsarkitekturin setur viðlíkahaldsarbeiðini í verk í samráð við viðkomandi stovn / stýri, og verða arbeiðini styrd av Landsarkitektinum, sum hevur ávísingarheimildina .

**Viðlíkahald :**
So hvørt sum tann almenna umsitingin veksur, veksur fermetratalið, har umsitingin skal húsast.
Størsti parturin av umsitingini húsast í bygningum, sum landið eigur. Áðren bygnaðabroytingarnar var eigarin Føroya Landsstýri v./ fíggjar-og búskapardeildin, og virkaði Landsarkitekturin sum bygningsumsiting við ábyrgd av viðlíkahaldi o.ø. Nú fara tey einstaku aðalstýrini at ogna sær bygningar, og standa tey nú sum eigarar. Landsarkitekturin er ikki longur knýtt at eigaran, og hava aðalstýrini nú starvsfólk, - ikki byggikøn fólk -, sum hava ábyrgd av bygninginum/bygningunum hjá stýrinum, tvs at hvørt aðalstýri sær er við at stovna egna bygningsumsiting.
Eg meti hetta vera eitt sera óheppið rák. Ymiskt er, hvussu nógvar bygningur, aðalstýrini hava ábyrgd av, men grundarlag er ikki fyri, at hvørt stýri kann hava egna bygningsumsiting á fullgóðum fakligum støði. Um stýrini arbeiðir hvør í sínum lagi, verður tað trupult at fáa samlað yvirlit og yvirorðnaða stýring av viðlíkahaldinum, eins og tað helst verður størri munur á støðið á arbeiðs-viðurskiftini hjá teimum ymiskum stýrinum.

Landsarkitekturin kannar í løtuni telduforrit til bygningsviðlíkahald, sum tykist vera eitt sera gott amboð til langtíðarplanlegging av viðlíkahaldsarbeiðum og av játtanatørvinum.
Í telduforritinum skal byggjast upp ein databasa við upplýsingum um bygningunum, og tað vil vera sjálvsagt at gera skráseting av øllum ognum landsins í hesum sambandi. Í hesum sambandi vil tað eisini vera upplagt at skrásett øll bygnings-/hølisleigumál, sum landið hevur við privatu.
Flestøll viðlíkahalds-forritini eru sett saman av modulum, soleiðis at eitt nú búskaparstýring í sambandi við leigumálum kann knýtast at forritið við einum moduli.

**Útleigan:**

Allir almennir stovnar, ið húsast í ognum hjá landinum, gjalda húsaleigu. Á henda hátt verður leiguútreiðslan hjá øllum stovnum ein partur av teirra rakstri. Hetta vil føra við sær, at stovnarnir fara at nýta sínar fermetrar betur, tí leiguútreiðslan sæst aftur í rakstrinum.
Ein partur av leiguinntøkuni verður nýttur til viðlíkahald, sum arkitektafunktiónin umsitur. Hetta eigur at vera sett í verk í sambandi við fíggjarlógina fyri ár 2000.

**Útleigan:**
Eg meti, at rættast er, um allir ognir verða ogn hjá einum stýri, Fíggjarmálastýrinum, og at øll aðalstýri gjalda leigu fyri hølini, tey eru í. Bygningsumsitingin, t.e. Landsarkitekturin, eigur at vera hjá Fíggjarmálastýrinum, og hevur Landsarkitekturin ábyrgd av at skyldurnar mótvegis leigaranum verða røktaðar. Á hendan hátt verður grundarlag undir einari bygningsumsiting á fullgóðum fakligum støði og við at miðsavna á hesum økinum verður man betri førur fyri at raðfesta við atlit til fíggjarlógararbeiðið, eins og man betri kann tryggja, at hølisviðurskiftini hjá almennum starvsfólkunum verða so líka sum gjørligt. Í sam-bandi við nýbygging vil hetta merkja, at Fíggjarmála-stýrið yvirtekur bygningina, tá ið byggingin er líðug. Tá ið byggiharrin, aðalstýrið, veit, at hann seinni skal gjalda leigu í mun til fermetrartalið, fer hann helst at hava hógv, hvat í støðd og fermetrartal viðvíkir.
Landsarkitekturin vil eisini verða tann sjálvsagdi umsiting fyri samskifti uttaneftir um byggi- og planleggingar-mál, tað vera seg við kommunar, sum væntandi fara at fáa fullkønar byggideildir aftaná kommunusamanleggingini, ella við útlondum.

## Ískoyti

### Onnur lond

Víst verður til Statsbyg í Norge og Slots- og ejendomsstyrelsen i Danmark.

*Statsbygg*
Statsbygg er ognarumsitari, byggiharri og ráðgevi í byggi- og ognarmálum fyri statsligum "etater" í Norge. Statsbygg er eitt umsitingarvirki undir Arbeiðs- og administrationsdepartementet í Norge, og verður rikið eftir handilsligum meginreglum í kapping við aðrar útleigarar á ognarmarknaðinum.

Statsbygg eigur og fyrisitur uml. 2,5 milliónir fermetrar gólvareal í Noregi og uttanfyri. Statsbygg hevur ábyrgd fyri at skipa fyri, ráðleggja og gjøgnumføra byggiverkætlanir fyri umleið 3 milliardur kr. árliga. Statsbygg veitir eisini ráðgeving og stuðul í byggifakligum og tekniskum spurningum, og hevur sum uppgávu at menna økir (hølir), sum staturin ikki nýtir longur.

Statsbygg varð annars stovnað sum direktorat í 1959, sum administrativt fekk ábyrgd fyri at ráðleggja og byggja nýggjar bygningar og fyri umsitingini av bygningunum. Í 1989 varð eitt álit lagt fram, nevnt ein betri skipaður statur. I hesum áliti var stutt greitt frá einari nýggjari budgetterings- og stýriskipan.

Uppskotið hevði við sær, at allir almennir stovnar skuldu rinda húsaleigu. Direktoratið skuldi skipast sum "en nettobudsjetteret forvaltningsbedrift, med krav til driftsresultat, der investeringer ble aktivert med beregning av renter og avskrivninger for investeringer foretatt eftter 1.1.1993, samt at det ble oprettet et reguleringsfond for forvaltningsbedriften.

Umsitingarvirki "Statsbygg" varð sett á stovn 1. januar 1993. Síðan er leiguskipanin so líðandi sett á stovn.

Leiguskipanin viðførir at Statsbygg útleigar hølir eftir marknaðartreytum. Tað vil siga, at fakdepartementerne kunnu samráðast frítt um longd á leigumáli, prísi og fermetrastøddina. Fakdepartementerne fingu tá somu fríheit í sambandi við privatar útleigarar.

*Danmark*

Slots- og ejendomsstyrelsen (SES) er eitt statsvirkið skipað undir Bolig- og byministeriet. Stýrið umsitur og útleigar skrivstovuhølini hjá statinum til ministeriur, stýri v.m. SES finnir eisini egnaði hølir til miðfyrisitingina í privatum útleiguhølum og samráðast fyri leigarar um leigusáttmálar.

Hvar skal landsarkitekturin støðast innan almennu umsitingina ?

Inntil 1997 var ábyrgdin av almennari nýbygging og almennum bygningum hjá táverandi Fíggjar- og Búskapardeild. Játtarnin til ávv. nýbygging og viðlíkahald lá hjá teimum ymisku deildinum, og arbeiðini kunnu setast í verk í samráð við Landsarkitektin.

Sambært arbeiðssetninginum frá Løgmansskrivstovuni ynskir Landsstýrið, at virksemið hjá Landsarkitektinum skal skipast saman við *byggifrøðiligi serkunnleikanum í síni heild.*

Tað verður ikki útgreinað, hvat "byggifrøðiliga serkunnleikin í síni heild" er. Stovnar og umsitingar á hesum øki, sum í størri ella minni mun hava meinlíkar funktiónir, eru:
- Landsarkitekturin
- Ein partur av Landsverkfrøðinginum
- Brunaumsjónd Landsins
- Matrikulstovan
- FLS-skipanin

Hesir stovnir og umsitingar hava hvør sítt fakøki, hvør sín virkishátt, hvør sína støðd og hvør sína søgu.

Ein nýggj byggiumsiting kann **ikki** stovnast við at leggja eitt nýtt arbeiðs-/ábyrgdaøki afturat arbeiðsøkið á verandi stovnum / umsitingum. Vanahugsan, ymiskar stovnsmentanir og avgreiðsluhættir vil hava alt ov stóran ávirkan á virkishættin í nyggju umsitingini.

Skal ein nýggj byggiumsiting kunna virka, skal hon skipast og mannast av nýggjum sum eini sjálvstøðuga eind, møguliga við manning úr verandi stovnum/umsitingum.

Byggi- og bygningsumsitingin skal veita tvørgangandi tænastu, og eigur tí at vera í einum tvørgangandi støði í bygnaðinum. Byggi- og bygningsumsitingin viðger málini við atliti til tey byggifakligu viðurskifti úteftir, tvs mótvegis stýrum og stovnum, og tey búskaparligu viðurskifti inneftir, tvs. mótvegis aðalstýrið.
Útfrá hesum tykist Fíggjarmálastýrið at vera rætta stýrið fyri byggi- bygningsumsitingini.

Omanfyri nevndu "byggiserfrøðis"-stovnar og -umsitingar vísa til vinnumálastýrið. Tað kann tí tykist eyðsæð at leggja byggi- og bygningsumsitingin undir vinnnumálastýrið.

Landsarkitekturin og Landsverkfrøðingurin hava nógvar meinlíkar uppgávur, og kann eitt tættari samstarv, enn tað, sum hevur verið, verða til stimbran fyri báðar partar. Men hóast uppgávurnar eru meinlíkar, so hava arkitektar og verkfrøðingar hvør sítt arbeiðsøki at røkja.

Byggi- og bygningsumsitingin skal hava ein greiðan profil, bæði mótvegis øðrum stýrum og stovnum í almennu umsitingini og mótvegis teimum pørtunum í samfelagnun, sum hon náttúrliga skal sam-skifta við.
Byggi- og bygningsumsitingin skal tí hava beinleiðis tilvísing til aðalstjóran í stýrinum, har hon verður sett.

Landsverkfrøðisstovnurin er ein sera væletableraður stovnur við einum sterkum "stovnsprofil". Ein nýgj byggi- og byggingsumsiting, sum sum hevur sítt sjálvstøduga ábyrgdaøki, eigur at hava sín egna profil.

Tað er umráðandi fyri byggi- og bygningsumsitingini at kunna varðveita sína integritet, soleiðis at tann, sum móttekur tænastu, kann vera fullvísur í, at tænastan er loyal og saklig.

Ole Jensen

Á figurum 1 og 2 er lýst møgulig skipan av byggi- og bygningsumsitingini.




Fig 1. Byggi- bygingsumsiting/Landsarkitekturin.




Fig 2: Landsarkitekturin, sum ein av fleiri, javnsettum fakdeildum undir felags umsiting.